# E - og tónleikurin



**Suni Merkistein, útvarpsmaður**

*Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?*
– Jú, orgul hevur verið fast innbúgv í húsinum nærum alla mína tíð. Pápi mín var tann einasti, sum spældi. Hann spældi eisini harmoniku og munnharpu.

*Spælir tú nakað ljóðføri?*
– Nei, eiðasørur.

*Syngur tú undir brúsuni?*
– Eg kann hava tónleik ella útvarp frá, men syngi sjáldan fyri ikki at siga ongantíð undir brúsuni.

*Hevur tú nakrantíð droymt um at gerast tónleikari?*
– Jú, meira enn so. Var sum yngri hugtikin av trummuljóðførinum, men havi ongantíð átt ella tíansheldur spælt upp á trummur. Ístaðin vóru Omo-trummur og lok av karamellblikkum riggað til húsbrúk. Vit høvdu eitt kjallaraorkestur einaferð. Hinir dugdu at spæla gittar. Teir vóru Súni & Páll Danielsen og Bjarki Thomsen. Eigi framvegis eina heimaupptøku av okkum fýra. Vit spæla "Rock and Roll over the World" hjá Status Que.

*Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?*
– Tónlistin er tann fínasta listin av øllum, haldi eg. Góður tónleikur kann vekja sterkan kenslumátt og stimbra hugflog og ímyndingarkraft. Tá ið tónleikur er bestur er hann balsam fyri sál og sinni.

*Hvussu nógvar fløgur/plátur/bond eigur tú?*
– Kanska einar 300 fløgur - pláturnar eru færri. Havi kortini arvað fitt av singleplátum frá elstu systrini.

*Hvat er tín yndisfløga?*
– Torført at taka dagar ímillum tær bestu. "Abbey Road" hjá The Beatles, "Unplugged" hjá Eric Clapton, "Vælferðarvísur" hjá Kára p., "Terji & Føstufressar", "Best of Bob Dylan", "Rubber Soul" hjá The Beatles, "A night at the opera" hjá Queen, "Volume one" hjá Traveling Wilburys, "Money for nothing" hjá Dire Straits, "Best of Cat Stevens", "Forklædt som voksen" hjá Kim Larsen o.s.fr.

*Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar afturfyri?*
– Fái ikki komið í tankar um nakra, sum hevur uppiborið so vánaligt skoðsmál.

*Hvør sangur skuldi ongantíð verið skrivaður?*
– Sama svar sum í undanfarna spurningi.

*Hvat er tann pínligasta plátan, sum tú eigur?*
– Onkur er (minnist ikki, hvussu tær eru komnar í savnið), sum eg ongantíð havi hug at lurta eftir. Um tað er teimum ella mær, ið tað er galið við, er so spurningurin!

*Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?*
– Kanska "I should have known better" hjá The Beatles - við einum toluligum vinki vælsaktans!

*Hvat er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?*
– Alt valdast, hvussu hýrurin er á tær og teimum, ið tú ert saman við. Nøkur boð:
Joe Cocker, Dubliners, Peter Cetera, Phil Collins, ABBA, Barry White, Hermann Jacobsen, Frændur, o.s.fr. - úrvalið er endaleyst.

*Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?*
– Er friður í húsinum, riggar lættur, klassiskur tónleikur væl sunnumorgnar. Spæli tó sjáldan tónleik sunnumorgnar. Plagi kortini sum oftast at lurta eftir Janus Mohr í ÚF.

*Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?*
– Talentleysur tónleikur.

*Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?*
– Til dømis »Kiss Me Quick« hjá Elvis.

*Hvat er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?*
– »Á mønu hjalsins stari«/Kári Mouritsen, »Kvøldarsólin"«/ Nikolina á Kamarinum, »Julen har englelyd« / Aksel Schøitz.

*Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?*
– Tað havi eg onga meining um.

*Hvat er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?*
– Paul McCartney í Parkini mei 2003. Tað var ein serlig løta. Eg havi annars ikki verið tann heilt stóri konsertfresarin. Eg kundi eisini nevnt Shu-bia-dua/ Sebastian/Rugsted & Kreutzfeldt í Ítróttarparkini august 1981, Kára P. í Norðurlandahúsinum februar 1992, Afzelius & Wiehe í Norðurlandahúsinum august 1993 og Harkaliðið í Lærara-skúlaauluni mei 1994.

*Hvønn tónleikara hevði tú viljað hitt?*
– Sir Paul McCartney!

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

## TELDUBRÆVIÐ

Frá: Turid Mørkøre, Noreg, turid.morkore@akvaforsk.nlh.no
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Pre-rigor fleking

Stivlarnir eru settir eftir eina drúgva, fiskiliga og buldraliga arbeiðsøkt. Miðið á hesum sinni er ein royndarstøð á eini lítlari oyggj nakað sunnan fyri miðjuna á Noregi. Eri her í arbeiðsørindum, saman við lesandi frá Landbúnaðarháskúlanum, umframt nøkrum øðrum sum eisini fáast við gransking av aldum fiski. Kanningin vit fáast við, sigst hava stóran áhuga fyri norsku alivinnuna. Hugsaði tí, at eg í stuttum kundi greiða frá, hvat hon snýr seg um.

Kanningin, ið er fíggjað av „Norges Forskningsråd", røkkur yvir fleiri ár, og hevur sum høvuðsendamál at greina góðsku á laksi sum er flaktur beint eftur tøku, ella pre-rigor flaktum laksi. Hetta er eitt evni, sum hevur stóran áhuga, við tað, at alt fleiri norðmenn sum fáast við aling, ella haggreiðing av aldum laksi, síggja vinning í at flekja laksin beint eftir tøku, heldur enn at bíða við flekingini til fiskurin ikki er deyðstívur longur (post-rigor) -tvs. einar 4 dagar eftir tøku. Eventuelt útflyta fiskin kruvdan.

Pre-rigor fløk gerast munandi styttri (eini 10-15%) enn post-rigor fløk, og tey hava aðrar góðskueginleikar. Orsøkir til, at pre-rigor fleking av laksi hevur vakt so stóran ans, er at tílík fløk kunnu útflytast beinanvegin eftir tøku, og harvið koma skjòtari og feskari á marknaðin. Harumframt er liturin á fløkunum ofta reyðari, og tey hava nærum ikki spalting. Kanningar hava eisini víst, at smakkurin á pre-rigor fløkum er góður.

Pre-rigor fleking krevur, at laksurin gerst deyðsstívur drúgva tíð eftir tøku. Tí er eisini umráðandi at savna kunnleika um faktorar sum virka fremjandi og drálandi uppá útviklingina av deyðsstívleikanum. Á hesum sinni kanna vit um hungring hevur týdning fyri, hvussu skjótt fiskurin gerst deyðsstívur. Harumframt kanna vit, hvørji árin hungring, og stress undir tøkuni, hava á góðskuna á pre-rigor flaktum laksi. Góðskueginleikar, ið verða kannaðir er m.a. litur, fastleiki og spalting. Tað er kent, at stressaður laksur gerst skjótari deyðsstívur enn óstressaður laksur.

Tað eru ikki bara norðmenn, ið ynskja at nema kunnleika um góðskuna á pre-rigor flaktum laksi. Millum okkum eru eisini lesandi úr Chile og Bosnia. Tey skulu nýta úrslit frá kanningini til sínar høvuðsuppgávur. Chilenarin, Pablo, er ein ungur maður við ríkum aliroyndum, og hann fær sín lesnað fíggaðan av íðnaðinum í heimlandinum. Hann hevur klárað seg væl, hóast veðrið ikki hevur verið til vildar. Verri hevur gingist hjá bosnisku dámuni, Vildanu. Hon er uppvaksin í Sarajevo, og tað er eyðsæð, at har er kolandi útsynningur við heglingi og fiskaluktur ikki gerandiskostur. Hugaligt hevði sjálvandi verið, um ein føroyskur lesandi eisini hevði verið millum okkum.

Nú er seint, og best er at fara til songar. Í morgin er aftur ein dagur. Ein pre-rigor dagur.




# Søkt verður eftir framleiðsluleiðara

*Havsbrún er eitt av stórstu og tøkniliga mest framkomnu framleiðsluvirkjunum í Føroyum við 90 starvsfólkum og einum umsetningi uppá uml. 470 mill. kr árliga. Havsbrún framleiðir fiskamjøl- og lýsi á Mjøldeildini, og alifóður á Fóðurdeildini. Størri helmingurin av framleiðsluni fer til útflutnings.*

Vit søkja eftir einum framleiðsluleiðara til Mjøldeildina, at byrja 1. januar 2004. Vit kunnu bjóða eitt spennandi arbeiði í einum dynamiskum umhvørvi, har menningin gongur við rúkandi ferð.

**Arbeiðsuppgávur:**
Ábyrgd av framleiðsluni av fiskamjøli og lýsi, her undir ábyrgdina av:
- operatørum og framleiðslustarvsfólkum
- støðugt at optimera framleiðsluna
- at framleiðslutólini eru í góðum standi
- at góðskukrøvini verða hildin
- at menna framleiðslu og góðsku á lidnu vørunum

**Vit rokna við at tú hevur**
- góðan kunnleika til maskinur og teldur
- evni at arbeiða sjálvstøðugt
- góð leiðslu- og samstarvsevni

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 18. november 2003. Vil tú vita meiri, ert tú vælkomin at ringja til okkum ella senda teldupost.

HAVSBRÚN
**pf Havsbrún**
FO-530 Fuglafjørður
Tlf 41 44 00
Fax 41 44 01
E-mail: phs@havsbrun.fo

# Randarhús í Hoyvík til sølu



Niðara hæddin er 70 m² við stovu, køki, grovkøki, wc, gongd, trappurúmi og duri.
Á ovaru hæddini er hjúnarúm, 3 kømur, baðirúm og gongd, íalt uml. 50 m². Ovastaloftið kann innrættast. Harumframt er bilhús, úthús og hjallur. Garður er um ognina.
Grundøkið er 200 m² og liggur Millum Gilja 41, Hoyvík í barnavinarligum umhvørvi.

**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4 · Box 359 · FO–110 Tórshavn · Tlf. 311260 · Fax 311261
e-mail: advfelag@post.olivant.fo

Tormóður Djurhuus, adv. Jógvan Páll Lassen, adv.
Petur Even Djurhuus, adv. Jógvan E. Ellefsen, adv.
Ingi Højgaard, adv Anna Dam, adv.

Hervið verður søkt eftir starvsfólkum til barnaansingina hjá Vestmanna Kommunu at seta 1. desember 2003.

Starvsfólkini skulu ansa 40 børnum í vøggustovu- og barnagarðsaldri.

**Hesi starvsfólk skulu setast:**
1 pedagogur í 30 tímar/viku
1 pedagogur í 35 tímar/viku
4 pedogogar í 40 tímar/viku
2 hjálparfólkum í 40 tímar/viku

**Vit vænta:**
- at tit kunnu arbeiða sjálvstøðugt
- at tit eru fleksibul
- at tit eru opin og erlig
- at tit duga at síggja møguleikar fram um avmarkingar
- at tit hava góð samstarvsevnir

Møguleiki er fyri at gera avtalu um arbeiðstíðirnar.

Hjálparfólk verða sett, um pedagogar ikki søkja.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvi og møguligum viðmæli skal verða Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi 10. november, kl. 12.00.

Søkt verður eisini eftir 1 vaskifólki í 11 tímar um vikuna. Vaskifólkið verður lønt sambært sáttmála ímillum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Arbeiðarafelag.

Skrivlig umsókn skal verða Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi 10. november, kl. 12.00.

**Vestmanna Kommuna**

# Søkt verður eftir fólki

Søkt verður eftir fólki við starvsroyndum at arbeiða í blómuhandli.

Umsókn verður at senda innan 4. november

Árstíðirnar
J.C.Svabosgøta 10 · 100 Tórshavn · tel 317400

Sosialurin 341800



Vit gera gravarstaðin kláran til várið
Vit seta várleykir niður
Vit pynta gravarstaðin
við granni til jólar
Eisini seta vit ljós upp
til jólar og nýggjárs

**Ring í góðari tíð**

**Gravstaðar - røktin**
v/ Vagn Jákupsson í Geil
Tel: 226270
vg@post.olivant.fo
www.gravstadarroktin.fo

**Hyundai Sonata 2.0 bensin**



prísur 183.500,-

Myrkagráur · árgang 2002 · km. 32.000
El-rútar · aircondition v.m.
Sera vælhildin

**Toyota Hiace 2.4 diesel**



prísur 58.000,-

Hvítur · árgang 1993 · km. 208.000
Summardekk og píkadekk í góðum standi fylgja við

BILVERKSTAÐIÐ
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla
Tlf 31 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

Sosialurin 341800

# Arbeiðshandskar
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc fo

Sosialurin 311820

Vit hava

* kotavadmal
* tógv til skjúrt/troyggjur

á goymslu.

Ring og hoyr nærri.
Vit senda um alt landið.

Spf. VEVSTOVAN Mýrifípan
Stoffalág 46
100 Tórshavn
Tel 31 43 35/21 43 35